

Pál Joensen á sigursskamlinum saman við Alex Di Giorgio úr Italia (v.m.) og Xavier Mohammed úr Stóra Bretlandi



Gullkrónan verður góðskumett av evropameistaranum

# jdan

Álvarin tekur tó skjótt yvir, og ungi svimjarin viðgongur, at hann hesa løtuna, lið um lið við Giorgio, bar ótta fyri at missa alt á gólvið. Eisini hann skeitti ein tanka til Danish Open, tá marginalarnir mutaðu ímóti. Men sum nevnt – hesaferð helt.

– Komin á mál hugsaði eg ikki neyvt um, hvussu lítil munurin var. Eg staðfesti bara, at eg fyrstur á mál, og tað var virkuliga deiligt. Eg kláraði tað!

Pál Joensen smílist aftur, og seriøsiteturin og gleðin við at vinna tykjast vera í fullkomnari balansu. Ungi evropameistarin hevur í kvøld eisini svomið seg ígjøgnum heilsanir, smsboð og góð orð við á vegnum frá sínum nærmastu, vinfólki og kenningum heima í Føroyum. Eisini formaðurin í Svimjisambandinum ber heilsan av síni summarferiu í Fjareystri, haðani hann á internetinum hevur fylgt gongdini hjá gullfuglinum í føroyskari svimjing:

- Evropeiska gullheiðursmerkið hjá Pál Joensen hevur stóran týdning, bæði fyri føroyska svimjing og føroyskan ítrótt í síni heild, sigur Palli Ziskason, sum roknar við at gullheiðursmerkið fer at lyfta føroyska svimjing, sum tó avgjørt hevur tørv á betri umstøðum beinanvegin.

Palli Ziskason er forsprákari fyri hugsanini um, at einstaklingaítrótturin skal styrkjast og raðfestast hægri enn liðítrótturin. Eftir hansara tykki er tað í einstaklingaítrótti, at vit føroyingar kunnu gera ein vørr. Kunnu skriva søgu, júst sum í kvøld.

## Soleiðis svimja teir:

**Hósdag seinnapart:**
1500 m frí, finala

**Fríggjamorgun:**
200 m rygg, innleiðandi til hálvfinalu

**Fríggjadag:**
200 m rygg, møgulig hálvfinala

**Leygarmorgun:**
50 m rygg, innleiðandi til hálvfinalu
800 m frí, innleiðandi

**Leygardag:**
Hálvfinaluna í 50 m rygg
Finala í 200 m rygg
Finala í 800 m frí
Finala í 50 m rygg

### Disiplin

Klokkan nærkast tíggju á kvøldi í serbiska høvuðsstaðnum, og nýklakti evropameistarin skal í song. Skínandi gullheiðursmerki gevur einki wildcard til frídagar, fest ella býtúrar. Heldur ikki, hóast eingin kapping er á skránni fyrrapartin í morgin, tí evnaríki vágbingurin við góðum tilmeldingartíðum longu hevur svomið seg í finaluna í 1500 metrum frí seinnapartin.

Pál Joensen er aftur lítillátin og stoltur í senn, tá eg takki fyri samrøðuna. Hann veit væl, hví hann skal í song nú, hóast ein natúrligur tanki fyri ein tannáring tíðliga á kvøldi eftir tídningarmesta sigur nakrantíð neyvan er svøvnur. Men tað er væl eisini hetta, sum skilir elituna frá tí elementera, vinnarar frá luttakarum og Pál frá restini av Evropa. Hetta, saman við einum vilja av stál, jarnharðari disiplin og professionalismu fyri hvønn millimetur. Pál Joensen hvørvur inn í sítt egna kamar og letur aftur pallin til sín mentor og venjara, Jón Bjarnason.



– Tað vóru fólk, ið hildu okkum vera svakar, tá vit fyri tveimum árum síðani søgdu, at Pál ætlaði at gerast evropameistari í 2008. Nú hava vit prógvað, at stríðið hevur verið tað vert og at hart arbeiði lønar seg, sigur Jón Bjarnason



– Eg var væl við frá byrjan, men misti orienteringina og rakti banatogið. Tá reyk øll mín fyrireiking og eg kom ongantíð fyri meg aftur, sigur Kári á Høvdanum

# Kári rakti banatogið

**Kári á Høvdanum legði bragliga út í innleiðandi til 100 m rygg fyrrapartin í gjár, men hálvan veg úti í 50 metra hylinum rakti hann banatogið, og tað oyðilegði avrikið. Kortini setti hann nýtt, føroyskt met.**

SVIMJING
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Venjing undir opnum himni í tveir dagar var kanska ov lítið. Orienteringin, ið er so altavgerandi fyri ein ryggsvimjara, kiksaði í uttandura, 50 metra hylinum. Dómurin var náðileysur og Kári á Høvdanum í roynd og veru avskrivaður, hóast hann stríddist mannliga. Ungi svimjarin úr Fuglafjarðar Svimjifelag legði annars væl út og var fremstur eftir startin. Men 25 metrar úti var hann so óheppin at raka banatogið, og tað ávirkaði restina av hansara avriki í kappingin.

- Eg var væl við frá byrjan, men misti orienteringina og rakti banatogið. Tá reyk øll mín fyrireiking og eg kom ongantíð fyri meg aftur, sigur Kári á Høvdanum, sum kom á mál sum nummar fimm av átta í riðlinum.

Óhappið hjá honum kostaði millum eitt og tvey sekund, umframt at øll fyrireiking og allur taktikkur fór fyri skeytið.

- Sjálvur meti eg, at eg átti at svomið eini tvey sekund skjótari, sigur Kári á Høvdanum, sum kom á mál við tíðini 1:00:68.

### Setti kortini met

Tíðin rakk ikki til pláss í hálvfinaluni seinnapartin í gjár, tí endaði gjárdagurin hjá Kára tíðliga. Men hóast óhappið við banatognum setti Kári á Høvdanum kortini nýtt føroyskt met. Gamla, føroyska metið var 1:00:95, og tað metið átti Kári sjálvur.

Kári á Høvdanum kiksaði í fyrstu roynd. Men ungi svimjarin hevur góðar vónir til restina av evropameistarakappingini, har hann fríggjadagin svimur 200 m rygg og leygardagin 50 m rygg.

- Tað vóru góð ting at hóma, hóast eg skuldi havt svomið teinin eini tvey sekund skjótari. Men eg havi framvegis góðar vónir og eri væl fyri, sigur Kári á Høvdanum.